# Kristian Sune triðja árið á rað

**BILLARD** Klaksvíkingar vístu seg eisini í einstaklingakappingini í billard at vera stinnir, tí á páskum áttu teir báðar finalistarnar í FM-kappingini, sum Kristian Sune Høgnesen vann triðja árið á rað

Hilmar Jan Hansen

Kappingin varð spæld á báðum borðunum í Havnar Klubba á páskum, og tilsamans vóru 12 mans við. Men nokk so skjótt vísti tað seg, at teir tríggir, ið endaðu við at fáa heiðursmerki, fóru eitt sindur frá hinum níggju. Tí líktist tað av álvara einari kapprenning millum Kristian Sune Høgnesen og Hall Joensen úr Klaksvík og Niels Nielsen úr Havn – og teir tríggir endaðu eisini við at vinna gull, silvur og bronsu í júst somu raðfylgju.

Hóast Niels átti besta spælið í kappingini við 600 eygum og eisini átti besta meðalumfarið, mátti hann síggja klaksvíkingarnar fara fram um seg og í finaluna. Har legði Kristian Sune bragdliga fyri og kom skjótt á odda ímóti Halli, so finalan ikki gjørdist so øgiliga spennandi. Kristian Sune fekk umleið 480 eygu og Hallur um 100 eygu færri.

Gjøgnum kappingina vóru fleiri rættiliga javnir dystir, men samanumtikið vóru úrslitini heldur lakari hesa ferð, enn tey hava verið í øðrum líknandi kappingum. Men tað tók einki frá Kristian Sune, ið veruliga hevur víst stórform seinnu árini og hesa ferð vann føroyameistaraheitið triðja árið á rað!

*einslistir@kallnet.fo*




*Tríggir teir fremstu billardspælararnir í landinum: Hallur Joensen, Kristian Sune Høgnesen og Niels Nielsen*

# Hæddarlop á Tórsbreyt

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR** Fyri fyrstu ferð síðani 2002 og fyri fyrstu ferð nakrantíð á Tórsbreyt, var leygardagin skipað fyri kapping í hæddarlopi

Hilmar Jan Hansen

Um vikuskiftið skipaði Hvirlan aftur fyri einari av sínum opnu kappingum, og hesa ferð var kappast í hæddarlopi, kúluvarpi og renning á 200 og 800 metra teinunum.

Serliga merkisverd var kappingin í hæddarlopi, tí hetta er fyrsta kappingin í hesi grein, síðani Frælsur Ítróttur Føroya var sett á stovn í 2002, umframt at hetta var fyrstu ferð nakrantíð, at kappast var í hæddarlopi á Tórsbreyt.

Og júst í hæddarlopi vísti tað seg, at ein av ungu monnunum í bólkinum 16-17 ár, Trygvi Laksáfoss, veruliga gjørdi vart við seg. Hann stóð seg best av teimum sjey, ið royndu at koma upp um bummin, og honum eydnaðist at koma upp á ein metur og 63 sentimetrar, sum er bara 12 sentimetrar frá føroyska metinum hjá monnum.

Hetta er í allar mátar merkisvert, tí hæddarlop er ein tekniskt krevjandi grein, og tá Trygvi megnar at koma so nær føroyska metinum hjá teimum vaksnu, er væl lítið at ivast í, at tað metið skjótt stendur fyri falli. Rógvi Højgaard kom upp á somu hædd sum Trygvi, men so skal eisini sigast, at Rógvi er ellivu ár eldri.

Í kúluvarpi gekk eisini væl, tí ikki færri enn tíggju av teimum tólv, ið royndu seg, kundu fara heimaftur við persónligum meti. Tann, ið fekk mest burturúr, var tó Helgi Geyti, sum í bólkinum dreingir 16-17 ár megnaði at varpa fimm kilo tungu kúluna út á 10,97 metrar.

Eisini hjá teimum yngru stóð Marita K. Petersen seg væl. Hon kappast í bólkinum gentur 12-13 ár, har kúlan vigar tvey kilo, men henni eydnaðist at varpa hana út á 7,46 metrar.

Úrslitini frá kappingini kunnu annars síggjast á www.hvirlan.fo, har tað eisini ber til at fylgja við í, hvussu verður við komandi kappingin. Tann næsta opna kappingin hjá Hvirluni verður tann 24. apríl, men enn er ikki greitt, hvørjum greinum, kappast verður í.

*einslistir@kallnet.fo*

